# Uttanríkis- og vinnumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 13. mars 2023 |
| Mál nr.: | 23/06898 |
| Málsviðgjørt: | jd |
| Ummælistíð: | 14.-17. mars 2023 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum**
(Broyttur fíggingarleistur og lógartøkniligar rættingar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 170 frá 20. desember 2017 um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum verða gjørdar hesar broytingar.

**1.** §§ 1-2 verða orðaðar soleiðis:

“**§ 1**. Fyri filmar, sendirøðir og heimildarfilmar, sum verða framleidd í Føroyum, verða 25% av útreiðslunum, sum eru hildnar í Føroyum, afturbornar, um umsøkjarin annars lýkur treytirnar.
*Stk. 2*. Er framleiðslukostnaðurin fyri eina einstaka verkætlan oman fyri 20 milliónir kr., kann umsóknin bara gangast á møti, um játtan fæst til vegar á løgtingsfíggjarlógini.
*Stk. 3*. Í seinasta lagi 15. august á hvørjum ári ger Filmshúsið eina skikkaða meting av verkætlanum, sum væntandi verða framdar í komandi fíggjarári.

**§ 2**. Afturbering eftir § 1 kann verða latin filmum, sendirøðum ella heimildarfilmum, sum heilt ella partvíst verða framleidd í Føroyum, og sum eru ætlað almennari útbreiðslu.
*Stk. 2*. Lýsingar, tíðindi, veruleikasendingar, undirhaldssendingar og ítóttarsendingar hava ikki rætt til afturbering eftir hesi løgtingslóg.”

**2.** § 6, stk. 1, litra a og b, verður orðað soleiðis:
”a) Framleiðslan skal vera við til at menna listarliga og tøkniliga vitan og førleikar í filmsvinnuni í Føroyum.
b) Fíggjarætlanin fyri framleiðsluna skal vísa, at í minsta lagi 500.000 kr. eru brúktar til útreiðslur, sum eru fevndar av § 8.”

**3.** § 6, stk. 2, verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2*. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at fakfólk og førleikar í Føroyum skulu brúkast í framleiðsluni, sbr. stk. 1, nr. 1."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Í politikkinum um skapandi vinnur varð mælt til at fremja ávís átøk fyri at stimbra skapandi vinnurnar, m.a. filmsvinnan. Farið varð tí undir eina skipan við afturbering fyri ávísar útreiðslur, sum vóru hildnar í Føroyum. Endamálið var at fáa fleiri filmsframleiðslur til Føroya, eins og endamálið var at menna royndir og vitan í Føroyum. Skipanin hevur virkað væl, og menning er at síggja í filmsvinnuni. Skipanin er kortini í ov stóran mun avmarkað av játtanini á løgtingsfíggjarlógini, og til tess at røkka yvirskipaða endamálinum um at stimbra skapandi vinnur er neyðugt at broyta galdandi reglur.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Eftir galdandi løgtingslóg um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum er samlaða afturberingin avmarkað til ta upphædd, sum verður játtað á løgtingsfíggjarlógini.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Lógaruppskotið hevur til endamáls at fáa til vegar víðari heimild og fastari karmar at bera aftur part av útreiðslunum, sum eru brúktar til filmsframleiðslu í Føroyum. Føroyar eru í harðari kapping við onnur lond um slíkar framleiðslur, og tískil er umráðandi, at tað í Føroyum eru somu skipanir sum í grannalondunum, skal endamálið røkkast. Hetta merkir, at Filmshúsið beinanvegin, sum umsóknir koma, kann boða umsøkjaranum frá, um afturbering verður latin, og tað hevur týdning, tá ið framleiðarar skulu velja sær framleiðslu- og arbeiðsstað.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Skipanin við afturbering verður broytt soleiðis, at umsøkjari, sum annars lýkur treytirnar fyri at fáa afturborið part av útreiðslunum, sum eru hildnar í Føroyum, fær afturborið 25% av hesum útreiðslum.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Filmshúsinum og Felagnum Føroysk Filmsfólk.

Lógaruppskotið hevur harumframt verið til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum í tíðarskeiðinum 14.-17. mars 2023.

Víst verður til hjálagda upprit um innkomnar viðmerkingar (verður skrivað, tá hoyringin er av).

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Fyri landið hevur lógaruppskotið ta fíggjarligu avleiðing, at skipanin við afturbering fyri útreiðslur í sambandi við filmsframleiðslu í Føroyum verður broytt soleiðis, at umsøkjari, sum annars lýkur treytirnar fyri at fáa afturborið part av útreiðslunum, sum eru hildnar í Føroyum, fær afturborið 25% av hesum útreiðslum.

Hetta er galdandi fyri filmar o.tíl., sum hava ein framleiðslukostnað upp á minni enn 20 milliónir krónur. Er talan um verkætlan, sum hevur ein framleiðslukostnað upp á meira enn 20 milliónir krónur, kann umsøkjarin fáa afturborið 25% av útreiðslunum, sum eru hildnar í Føroyum, um játtan er fingin til tess á løgtingsfíggjarlógini, og um umsøkjarin annars lýkur treytirnar.

Í míggjarlógini fyri 2023 er ætlanin at biðja um hægri játtan til endamálið

Til tess at fáa eina greiða meting av teimum útreiðslum, sum kunnu standast av broytingini, skal Filmshúsið á hvørjum ári gera eina skikkaða meting av væntaðum útreiðslum. Verkætlanir, ið eru fevndar av hesi áseting, taka drúgva tíð at fremja, og tí verður mett, at Filmshúsið, sum longu í dag verður kunnað um og veit um flestallar verkætlanir, sum verða framdar í Føroyum, væl kann gera hesa skikkaðu metingina.

Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri hvørki land ella kommunur. Tá umræður ta skikkaðu metingina, sum Filmshúsið skal gera, verður mett, at hetta kann gerast innan fyri verandi játtan hjá Filmshúsinum.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Fyri vinnuna hevur uppskotið ta positivu avleiðing, at møguleikin at fáa stuðul til framleiðsluna verður størri, og at tað tí er hugsandi, at fleiri filmsverkætlanir verða framdar í Føroyum.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Eingin viðkomandi millumtjóðasáttmáli er á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður, at uppskotið er í samsvari við *Hoyvíkssáttmálan* (Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sbr. anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sbr. bekendtgørlse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

**2.9. Markaforðingar**
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at lógaruppskotið fer at elva til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, eins og lógaruppskotið ikki verður mett at gera onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur hvørki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið ásetur, at Filmshúsið áðrenn 15. august á hvørjum ári skal gera eina skikkaða meting av verkætlanum, sum væntandi verða framdar komandi fíggjarár.

Aðrar heimildir eru ikki í lógaruppskotinum.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

***Til § 1, nr. 1***
§ 1, stk. 1 er orðað av nýggjum soleiðis, at filmsverkætlanir o.tíl., sum hava ein framleiðslukostnað upp á minni enn 20 milliónir krónur, fáa afturborið 25% av útreiðslunum, sum eru hildnar í Føroyum. Afturberingin er eins og frammanundan treytað av, at umsøkjarin annars lýkur treytirnar. Víst verður til almennu viðmerkingarnar.

Ásett verður somuleiðis, at er talan um eina verkætlan, sum hevur ein framleiðslukostnað upp á meira enn 20 milliónir krónur, fær umsøkjarin afturborið 25% av útreiðslunum, sum eru hildnar í Føroyum, um játtan er fingin til tess á løgtingsfíggjarlógini, og um umsøkjarin annars lýkur treytirnar.

Til tess at fáa eina greiða meting av teimum útreiðslum, sum kunnu standast av broytingini, t.e. serliga verkætlanir omanfyri 20 milliónir kr., skal Filmshúsið á hvørjum ári gera eina skikkaða meting av væntaðum útreiðslum. Metingin skal gerast í seinasta lagi 15. august á hvørjum ári.

§ 2 er orðað av nýggjum fyri at gera ásetingina greiðari, men eingin innihaldslig broyting er gjørd.

**Til § 1, nr. 2-3**
Ásetingarnar í § 6, stk. 1, litra a, og stk. 2 eru broyttar soleiðis, at heldur enn at vísa til *føroyska filmsvinnu* verður víst til *filmsvinnu í Føroyum*.

Innihaldsliga er ikki stórur munur á orðalagnum, men ásetingin kundi fatast soleiðis, at talan skuldi verið um føroyingar. Hetta hevur ikki verið ætlanin, tí endamálið er at menna filmsvinnu í Føroyum; endamálið er ikki at halda útlendingar, sum fáast við film í Føroyum, uttanfyri.

Ásetingin í § 6, stk. 1, litra b, er einans gjørd greiðari; eingin broyting er gjørd í innihaldinum.

***Til § 2***
Áseting um gildiskomu. Ásett verður, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, dagfesting.

**Høgni Hoydal**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringar svar frá....
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá.....